| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 26. apríl 2007 |
| Býráðsfundur nr. | 05/2007 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2007 tann 26. apríl kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. apríl 2007 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Súsanna Gaard
Petur Abrahamsen

Súsanna Gaard møtti sum varalimur fyri Jón Niolsøe Olsen. Jón hevur sent fyrisitingini e-post, dagfestur 26. apríl 2007 kl. 11.21, har hann boðar frá, at hann ikki kann møta til fundin, og at hann hevur sagt varalimi sínum frá hesum, somuleiðis, sum hann spyr um mannagongdir á økinum. Við telduposti sama dag kl. 11.24 eru mannagongdirnar kunnaðar honum, eins og tær eru gjørdar í fundarboðunum til hansara síðan hann varð fólkavaldur kommunustýrislimur tann 01. januar 2001, seinast við fundarboðum 19. apríl 2006.
Fyrisitingin hevur ringt til Súsonnu Gaard, dags dato kl. 12.25 og heitt á hana sum varalim hjá Jóni Nolsøe Olsen um at møta hansara vegna.

Signar á Brúnni møtti ikki vegna forfall. Fráboðan um hesi viðurskifti vórðu latin býráðnum, tá ið fundurin varð byrjaður, av Tórfríðin Abrahamsen, býráðslimi. Eingin fráboðan varð latin býráðsumsitingini, sí annars viðurskifti um hetta sambært skriv, dagfest 19. apríl 2007.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari
Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 30/2007 og 31/2007 vórðu til viðgerðar.

**Mál nr. 30/2007.**

**Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2006.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 16. apríl 2006 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2006 frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, undirskrivaður av Jógvan Amonsyni, statsaut. revisor og Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 18. apríl 2006 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara post fyri post og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2006 við broytingum (eykajáttanum).

Roknskapurin vísir ein fíggjartørv/hall upp á *kr. 8.888.883,00.*

Sambært høvuðsyvirliti 3 í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdum eykajáttanum í árinum:

| | Kontoheiti: | Roknskapur: | Fíggjarætlan við eykajáttanum | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Byggibúning | -2.826.539,00 | -2.663.000,00 | -163.539,00 |
| 2 | Kommunal virki | 1.431.482,00 | 1.990.000,00 | -558.518,00 |
| 3 | Teknisk mál | -3.689.421,00 | -3.712.000,00 | 22.579,00 |
| 4 | Skúla- og mentamál | -6.311.082,00 | -6.658.167,00 | 347.085,00 |
| 5 | Almanna- og heimsumál | -11.339.110,00 | -10.962.677,00 | -376.433,00 |
| 6 | Umsiting | -4.292.124,00 | -4.313.450,00 | 21.326,00 |
| | **Økið 1-6 tilsamans** | **-27.026.793,00** | **-26.319.294,00** | **-707.499,00** |
| 7 | Rentukostnaður-netto | -1.232.918,00 | -891.800,00 | -341.118,00 |
| | **Økið 1-7 tilsamans** | **-28.259.711,00** | **-27.211.094,00** | **-1.048.617,00** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Íløgur – studning | -20.788.736,00 | -23.580.000,00 | 2.791.264,00 |
| | **Samanteljing** | **-49.048.447,00** | **-50.791.094,00** | **1.742.647,00** |
| 83 | Avdráttir av lánum | -3.791.257,00 | -5.080.000,00 | 1.288.743,00 |
| | **Samanteljing** | **-52.839.704,00** | **-55.871.094,00** | **3.031.390,00** |
| 86 | Skattainntøkur | 43.950.821,00 | 40.596.657,00 | 3.354.164,00 |
| | **Fíggjartørvur** | **-8.888.883,00** | **-15.274.437,00** | **6.385.554,00** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Fíggjarbroytingar | -6.578.673,00 | 275.000,00 | |
| | Lántøka | 15.467.556,00 | 15.000.000,00 | |
| | **Fíggjarúrslit netto** | **0,00** | **563,00** | |

Býráðið hevur annars samtykt eykafíggjarjáttanir fyri tilsamans kr. 14.032.000,00 í árinum, og eru allar hesar fráboðaðar Innlendismálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í løgtingslóg nr. 67 frá 17. mei 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin

*Býráðið/fíggjarnevndin er somuleiðis skrivliga kunnað um av fyrisitingini, at ein eykajáttan í flestu førum førir eina útreiðslu við sær, sum beinleiðis ávirkar roknskap kommununar fyri 2006.*

*Hesar eykajáttanir verða útgreinaðar á niðanfyri standandi hátt:*

| | **Framdar eykajáttanir:** | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Øki** | **Íløgur framdar í:** | **Upphæddir:** | **Fígging:** | **Endamál:** |
| 2 | Havnabygging á Enninum | -12.500.000,00 | Lántøka | Íløga |
| 2 | Smábátahavnin-Ísvirki | -300.000,00 | Yvir rakstur | Íløga |
| 5 | Dagstovnur | -1.140.000,00 | Yvir rakstur | Íløga |
| 5 | Sosiala deild ráðgevi | -92.000,00 | Yvir rakstur | Rakstur |
| | **Tilsamans:** | **14.032.000,00** | **Lántøka/rakstur** | **Íløgur+rakstur** |

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 18. apríl 2007, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommunununar fyri 2006 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

**Avgerð:**

Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (7 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen). Sostatt varð roknskapur kommununar fyri 2006 samtyktur uttan viðmerkingar.

**<u>Mál nr. 31/2007.</u>**

**<u>Mál viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri ár 2008.</u>**

Mentamálanevndin hevur móttikið uppskot frá Umsitingini/Bókasavninum, dagfest 12. apríl 2007 til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri **árið 2008**.

Sambært uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar mettar til kr. 665.736,00 móti mettum kr., 630.520,00 í 2007. Inntøkurnar av rakstrarstudningi verða mettar til:

| | |
|---|---|
| Fuglafjarðar kommuna | kr. 399.442,00 |
| Landskassastudningur | kr. 266.294,00 |
| **Samantals** | **kr. 665.736,00** |

Sum tað sæst, so er lutfalsbýtið millum landskassa og kommunukassa í samsvar við nýggju bókasavnslógina......har býtið millum land og kommunu verður 60% í kommunurnar part og 40% í landskassans part. Frammanundan var býtið 40% í kommunurnar part og 60% í landskassans part.

Kommunan hevur tó bert fingið kr. 184.000 fyri 2006 sjálvt um fíggjarætlanin fyri 2007 hevur eina rakstrarætlan upp á kr. 630.520, og roknskapurin fyri 2006 hevði eina rakstrarútreiðslu upp á kr. 623.935,00, sum skuldi givið Bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á uml. kr. 251.000,00.

Tilsóknin um rakstrarstuðul frá Landsbókasavninum fyri 2007, dagf. 08. mars 2007 gevur somuleiðis Bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á kr. 184.000,00, har 40% satsurin átti at givið Fuglafjarðar Bókasavni nakað tað sama sum árið fyri t.v.s. uml. kr. 251.000,00.

Soleiðis góðkennir Føroya Landsbókasavn, sum nú er, ikki eina fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar Bókasavn, sum er størri enn kr. 460.000,00.

Um gongdin verður tann sama, so kann kommunan ikki rokna við einum rakstrarstuðli upp á kr. 266.294,00, sum henda fíggjarætlan leggur upp til.

Uppskotið til fíggjarætlan fyri stovnin fyri 2008 hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 18. apríl 2007, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna uppskotið til fíggjarætlan, sum javnvigar við kr. 665.736,00 móti kr. 630.520,00 í 2007, ásannandi at rakstrarstuðulin ikki verður 40% av teimum kr. 665.736,00, men heldur 40% av kr. 460.000,00.

**Avgerð:**

Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (8-0).

**Mál nr. 32/2007.**

***Viðvíkjandi tilboð upp á rennigravara til kommununa.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið tilboð frá P/F K.J. hydraulik, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, dagfest 27. mars 2007 upp á nýggjari gravimaskinu (rennugravara) til kommununa av merkinum Huddig 1260 upp á kr. 1.773.378,00 + meirvirðisgjald.

Fyri brúktu gravimaskinur er fyritøkan sinnað at taka hesar inn í býti við nýggju fyri ein samlaðan kostnað upp á kr. 195.000,00, útgreinað soleiðis, at latið verður kr. 50.000,00 fyri "BM Volvo 6300 maskinuna árgang 1988" og kr. 145.000,00 fyri "BM Volvo maskinuna árgang 1990".

Haraftrat er tilboð upp á ein mini rennugravara av merkinum JCB-8035 ZTS upp á kr. 295.000,00.

Prísmunurin verður sostatt kr. 1.873.378,00 + okkara partur av meirvirðisgjaldinum 6,25% kr. 117.087,00 ella tilsamans kr. 1.990.465,00.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 27. mars 2007, og mælir nevndin til at selja báðar gravimaskinurnar og keypa eina nýggja maskinu sambært tilboð + eina lítla maskinu.

Samráðingar verða tiknar upp við K.J. Hydraulik um eitt samlað tilboð fyri 2 maskinur + ketur og brekkara.

Mett verður, at samlaða tilboðið kemur at verða umleið kr. 2,0 mió., og heitir nevndin á fíggjarnevndina um at viðgera møguleikan við eini eykajáttan til møguligt keyp av 2 nýggjum maskinum til teknisku deildina.

Eftir fundin hevur tekniska deildin tosað við K.J. hydraulik um viðurskiftini, og vilja teir ganga við til, um keypið verður veruleiki, at lata brekkaran og keturnar ókeypis, virði fyri brekkaran umleið kr. 60.000,00 og keturnar kr. 40.000,00 ella tilsamans umleið kr. 100.000,00.

Í sambandi við fíggjarætlan kommununar fyri 2007, sum góðkend er av býráðnum við 2. viðgerð tann 29. november 2006, so er staðfest, at eingin peningur er avsettur til íløgur í nýggjar gravimaskinur til teknisku deildina.

Tí verður talan um eykajáttan, um keypið skal verða veruleiki. Í hesum sambandi skal verða upplýst, at ein eykajáttan skal hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal greitt ganga fram sambært § 41 stk. 2 Í somu lóg, hvussu eykajáttanin skal verða fíggjað.

Endaliga viðgerðin skal verða kunnað landsstýrismanninum í Innlendismálum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtykt býráðsins við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í kommunustýrislógini.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt tilmæli frá teknsisku nevndini frá 27. mars 2007 og mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum um keyp av nýggjum gravimaskinum til teknisku deildina fyri max. kr. 2,0 mó., og sølu av gomlu maskinunum, og at áheitan um eykajáttan verður løgd fyri býráðið upp á nevndu upphædd verður løgd fyri býráðið á fundinum 12. apríl 2007 til 1. viðgerð.

Nevndin mælir somuleiðis býráðnum til, at eykajáttanin upp á max. kr. 2,0 mió. verður fíggjað við lántøku.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 12. apríl 2007 og varð tilmæli frá teknisku nevndini um keyp samtykt. Málið um eykajáttanina upp á max. kr. 2,0 mió til keypið fíggjað við lántøku varð beint til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 26. apríl 2007.

**Avgerð:**

Samtykt varð við 2. og endaligu viðgerð at veita eina eykajáttan upp á max. kr. 2,0 mió., og at henda verður fíggjað við lántøku. (7 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.45.

Jann Toftegaard

Dánjal vang

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Súsanna Gaard

Tórfríður Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen